*Tað gongur væl hjá Western:*

# Seismiskt tilfar klárt í november

Tíðindini í gjár um, at trý stór oljufeløg eru farin saman í eitt samarbeiði um at kanna føroysku undirgrundina, koma væl við, ikki minst hjá teimum, sum í løtuni eru í ferð við at gera seismiskar kanningar. Felagið Western, sum hevur fingið einkarrætt til at gera seismiskar kanningar á føroyskum øki, bjóðaði herfyri út fyrstu kanningarúrslitini til sølu.

Nú frætta vit, at fyrsta tilfarið, sum í løtuni verður viðgjørt á høvuðs teldustøðini hjá Western í London, verður klárt at lata kundunum tvs. oljufeløgum síðst í november. Hetta er nakað fyrr enn roknað við.

Steve Butler, sum hevur kanningarnar hjá Western í Føroyum um hendi sigur við Sosialin, at tað sjálvandi gleðir teir at frætta, at oljufeløg eru hugað fyri seismiska tilfarinum.

Hann sigur, at tað er stórur áhugi millum oljufeløg fyri føroyska økinum, men hann kann ikki siga nakað um, hvørji feløg eru hugað fyri at keypa tilfarið frá Western.

Steve Butler sigur, at teir gera alt teir kunnu fyri at vekja áhugan hjá oljufeløgunum fyri tí tilfarı, sum teir í løtuni fáa til vega fyri føroyskar myndugleikar.

## Gingið væl

Hann sigur, at tað hevur gingið væl við kanningunum undir Føroyum, hóast teir hesa seinastu tíðina hava verið nakað darvaðir av ringum veðri. -Men annars kann eg siga, at vit eru sera væl nøgdir við tilfarið vit hava fingið og sum nú verður viðgjørd í London.

Enn er alt ov tíðliga at siga nakað um møguleikar at finna olju og gass. Fyrst skulu seismisku upplýsingarnir viðgerast í London. Tað næsta verður so hjá teimum, sum vilja keypa hesa rávøruna at góðska hana víðari tvs. at brúka ta nýggjastu tøknifrøðina til at kanna tilfarið frá Western.

Vidar Larsen, granskingarstjóri hjá Statoil í Danmark, sigur við Sosialin, at teir eru sera spentir at síggja fyrsta tilfarið frá Western. Teir hava sjálvandi "gamalt" tilfar frá føroyaøkinum, men tað mesta av hesum tilfarinum stavar frá tíðini, tá seismikkskipini ikki høvdu eins framkomna útgerð sum í dag.

Vidar Larsen sigur, at frá tí at teir fáa tilfar frá Western til teir kunnu gera sær nakrar víðari metingar um íløgur skulu gerast í útvega meira nágreiniligt seismiskt tilfar so sum 3D seismikk gongur helst eitt ár. 3D seismikkur er annað stigið í seismiskum kanningum tvs. tá tú fer meira niður í smálutir og kannar eitt ávíst øki meira nágreiniliga fyri at vita, hvar mest sannlíkt er at finna olju og harvið at skula bora.

Jan




*Polar Princess, sum hevur loyst Sea Star av og nú ger kanningar undir Føroyum. Mynd kalmar*




*Western hevur havt stórar lýsingar í aljtóða oljutíðarritum. Henda er úr Euroil í august. Her lýsir Western til sølu gamalt seismiskt tilfar, sum er viðgjørt av nýggjum við tí nýggjastu tøknifrøðini umframt komandi tilfar, sum í løtuni verður ráviðgjørt í London.*




*Hóast vit hoyra mest um BP, tá tosað verður um økið vestan fyri Hetland, so er Statoil við í fleiri verkætlanum í hesum økinum, betri kent sum Tranche 8, sum er tann parturin av bretsku blokkunum, ið liggur har norðuri út móti føroyska markinum. Her arbeiðir Statoil saman við bæði Mobil, Enterprice, Total og øðrum oljufeløgnum*


**UPPBOÐSSØLA**
**av**
**BRÚKTUM BILUM**

Vegna trotabúgv selja vit fleiri brúktar bilar við **MINSTU PRÍSUM !**

Uppboðssølan verður
**leygardagin 01.10.1994, frá kl. 10.00 á økinum hjá Pf. IVAN JOHANSEN, inngongd frá Staravegnum.**

Møgulig boð mugu vera okkum í hendi kl. 12.00.

Rann Teld
v/ Atla Klein Olsen
Postboks 205
110 Tórshavn
Fax.: 18703
Tlf. 18903 - 88903



**Kvinnuhúsið**

**Ráðgevingin hjá Kvinnuhúsinum er opin hvønn hósdag frá kl. 19.00–21.00, inngongd hjá KFUM, Oman Písuvarða 2, ella á tlf. 17200.**

**Kvinnuhúsið er opið gerandisdagar frá kl. 14.30–16.30. Telefonin, 17200, svarar hvønn dag frá kl. 14.30–7.00 á morgni.**